

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 02 - 2013

# Grøn orka - Føroyar 10 ár framman fyri ES

Føroyar eru longu 5 til 10 ár framman fyri Danmark og fleiri ES lond, tá talan er um at skifta vanligu oljuverkini út við vindi og øðrum varandi orkukeldum. Hetta sigur Peter Vinter, bygnaðararktitektur hjá DONG Energy við danska blaðið Politiken. Hann sipar við hesum til áhugaverdu og kollveltandi royndirnar hjá SEV við tí nýggju Power Hub skipanini. Henda skipan varð tikin í brúk á Sundi fyri stuttum. Hon er partur av einum menningar- og granskingarsamstarvi í ES, sum Føroyar eisini luttaka í. Politikken, sum er eitt tað størsta blaðið í Danmark, ger nógv burtur úr føroysku royndunum at menna varandi orkukeldur. Blaðið skrivar, at Føroyar eru eitt framúr gott laboratorium, tá tað snýr seg um at finna fram til, hvussu man tryggjar javna tilgongd av streymi, tá hon verður framleidd av óstøðugum keldum sum vindi og vatni. Restin av Europa fer at hava somu trupulleikar í nógv størri mun, tá av álvara latið verður upp fyri alternativum orkukeldum komandi árini. Peter Vinther frá DONG Energy, sum er partur av føroysku royndarverkætlanini, heldur Føroyar verða sera væl egnaðar at royna eina slíka skipan í minni vavi undir viðurskiftum, sum skjótt verða veruleiki í øðrum londum í Europa. Power Hub skipanin, sum er tikin í brúk í Føroyum í sambandi við, at fleiri nýggjar vindmyllur eru settar til netið hjá SEV, virkar á tann hátt, at ávísir brúkarar verða koblaðir av netinum, alt eftir, hvussu nógvur streymur verður framleiddur. Hetta verður gjørt fyri at tryggja javnvág í skipanini og fyri at sleppa undan streymsliti. Skipanin er ment í einum europeiskum samstarvi undir leiðslu av DONG. Verkætlanin er ein partur av eini størri ES-verkætlan, nevnd Twenties, sum skal optimera orkuveitingina í Europa sum partur av royndunum at minka um nýtsluna av olju, gassi og koli sum brennievni, og harvið kunna minka um $CO_2$ útlátið í 2020 við 20% í mun til nýtsluna í 1990. Hetta skal røkkast við, at 20% av orkunýtsluni skal koma frá vindorku og

bioorku. Tað er ein langur vegur frá tonkunum um stóran vøkstur í grønari orku í Europa, til tað verður møguligt at gera hesar ætlanir til veruleika við tí tøkni, sum skal gera hetta møguligt, sigur samskiparin av Twenties verkætlanini, Vincent Gonzales við Politiken. Í Danmark er málið, at 30% av orkunýtsluni í 2020 skal koma frá varandi orkukeldum. Og vindmyllur skulu framleiða helvtina av elorkuni. Í løtuni arbeiðir DONG saman við fleiri donskum fyritøkum um at brúka Power Hub skipanina til at stýra teirra orkunýtslu, soleiðis at tær kunnu brúka meira orku, tá nógv orka verður framleidd frá vindmyllum, og skrúva niður, tá minni grønur streymur er tøkur. Tað er greitt, at umheimurin fylgir væl við, hvussu royndirnar í Føroyum við Power Hub skipanini virka í veruleikanum. Politiken hevur eisini stóra grein um, at Føroyar leggja seg eftir at framleiða reina orku í framtíðini og hava sett sær fyri, at 75% av orkunýtsluni í 2020 skulu koma frá varandi orkukeldum.